## Dystir um vikuskiftið

**Formula-deildin**

| Dagf. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 26.05 | KÍ-B36 | Lars Müller |
| 28.05 | NSÍ-B71 | Jens Petur Brattalíð2- |
| 28.05 | HB-Skála | Petur Reinert |
| 28.05 | EB/S-GÍ | Dagfinn Olsen |
| 28.05 | AB-VB/S | Eiler Rasmussen |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 26.05 | ÍF-B68 | Ransin N. Djurhuus |
| 26.05 | LÍF-NSÍ | Høgni Hansen |
| 26.05 | HB-B36 | Eiler Rasmussen |
| 26.05 | FSV04-SÍ | Bárður Mortensen |
| 28.05 | TB-KÍ | Páll Augustinussen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 28.05 | EB/S-B68 | Eugen Voda |
| 28.05 | MB-ÍF | SÍ |
| 28.05 | GÍ-Skála | Kristian Sofus Petersen |
| 28.05 | FSV04-Fram | MB |
| 28.05 | B36-KÍ | Andrew Christiansen |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 28.05 | AB-GÍ | Jóan Petur Michelsen |
| 28.05 | EB/S-KÍ | Marner Olsen |
| 28.05 | B36-NSÍ | Torvald Petersen |

AB – VB/Sumba:

# AB fær málmann – VB/Su

**AB fær undantaksloyvi frá Fótbóltssambandinum til at leiga sær nýggjan málverja, nú teir báðir vanligu, Magnus Poulsen og Danny Rasmussen, eru skaddir. Tað kemur væl við undan botnbrakinum móti VB/Sumba, hvørt liðformaður er úti við skaða**

UPPTAKT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hvørgin partur vil viðganga tað, men stigatalvan lýgur ikki. Tað liðið, sum tapir dystin 2. hvítusunnudag, er so at siga dømt at flyta niður.

–Tað er ein rættiliga týdningarmikil dystur, men hann er ikki altavgerandi. Tað eru framvegis 48 stig eftir at spæla um eftir dystin mánadagin, men vinna vit ikki, so sær tað tungt út, ásannar liðformaðurin hjá AB, Jákup Martin Joensen.

Og Dan Djurhuus, sum er liðformaður hjá VB/Sumba, er av somu sannføring.

– Dysturin hevur heilt øgiliga nógv at siga, men skuldi tað ringasta hent, at vit tapa dystin, so fara kortini ikki at tveita handklæðið í ringin, sigur Dan Djurhuus avgjørdur.

Møguleikin fyri javnleiki er sjálvandi til staðar, men eitt stig til hvønn partin hjálpir ikki nøkrum nakað, og tí fara liðini at leggja alt fyri at fáa ein sigur í hús.

### Fingið undantaksloyvi

Á Argjum er lagi annars gott í dag. Har hava tey nevniliga fingið boð um, at tey fáa nýggjan málmann til avgerandi dystin. Magnus Poulsen hevur verið fyrsta val millum stengurnar, men hann fekk ein skaða móti HB og hevur ikki spælt síðani. Danny Rasmussen vardi málið móti EB/Streymi, og tað gjørdi hann sera væl. Tíverri fyri AB var Danny óheppin undir venjing og breyt sær handliðið. Soleiðis stóð AB brádliga uttan nakran sum helst málmann, og við afturlatnum flytingarvindeyga sá tað svart út hjá AB



Men í gjárkvøldið lýsnaði spakuliga, tá tað frættist um eina reglu í lógunum, sum nevndi undantaksloyvi fyri málmenn. Og í dag skein sólin, tá tað endaliga kom upp á pláss, at grein 16, stykki 4-5, gevur heimild til undantøk í serligum førum, sum til dømis á málmanspostinum.

Venjarin hjá AB, Oddbjørn Joensen, vil tó ikki siga, hvør fer at verja málið hjá AB móti VB/Sumba.

– Vit hava samband við nakrar, men eg vil einki siga, fyrr enn vit vita við vissu, hvør hesin verður, sigur Oddbjørn Joensen.

Spurdur beinleiðis, um teir fara at venda sær til HB og leiga hagani, svarar venjarin hjá AB, at tað er ein møguleiki millum aðrar.

Sosialurin skilir tó, at AB hevur verið í samband við Trónd Vatnhamar, sum situr á beinkinum hjá HB, men at tað eftir øllum at døma ikki verður hann, sum fer út á Argir ein túr.

Ein annar møguleiki er ein annar HB-ari, nevniliga Bárður Johannesen, sum jú gavst í fjør. Tað er ikki óhugsandi hesin finnur sær handskarnar fram aftur, men til tað krevst, at AB spyr EB/Streym um loyvi.

## Við – ikki við

**Ivasamur:** Fróði Clementsen (vøddaskaði)
**Skaddir:** Magnus E. Poulsen (fótlið), Danny Rasmussen (brotið handlið)

**Allir tøkir**

**Ivasamur:** Símin Hansen (lærkrikin)
**Við aftur:** Fabio (eftir leikbann)

**Skaddir:** Sorin Anghel (fótliðið), Arnbjørn T. Hansen (beinbrot)
**Leikbann:** Rafael Kwiecinski
**Við aftur:** Hans Pauli Samuelsen (eftir leikbann)

**Skaddur:** Hans Jørgen Djurhuus

# B36 trívist

Seinastu seks ferðirnar B36 hevur vitjað í Klaksvík, hava teir hvítu havt fullan stigaposa við sær heimaftur. Í aðrar mátar siga hagtølini, at NSÍ trívist væl móti B71, meðan uppgerðirnar í Havn og á Streymnesi tykjast meira spennandi. Eitt eru tó hagtøl, men nakað annað er, hvussu dystirnir um vikuskiftið verða. Men stuttlig kunnu hagtølini vera, at á talvuni sæst, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini um vikuskiftið hava dystast í tilsvarandi uppgerðunum í fremstu deildini seinastu tíggju árini.